

# FAKTA

**Mong høvdu gloymt alt um Tom Kummer, og fleiri eru tey, sum ynskja at gloyma hann fult og heilt. Men við filminum »Bad Boy Kummer« er ótrúliga søgan um journalistin, sum megnaði meiri enn tey flestu, aftur vakt til lívs.**

**Í dag er Tom Kummer 48 ára gamal, giftur og hevur tvey børn. Hann er úr Sveits, men 20 ára gamal flutti Kummer til Berlin, har hann byrjaði at skriva. Miðskeiðis í nítiárunum flutti Kummer til Los Angeles, har hann framvegis býr. Avdúkingin av alternativu journalistisku tilgongdini hjá Kummer, verður framvegis skýrd ein tann største gølan í journalistiksøgu Týsklands.**

**Umframt at skriva fyri fleiri stórar avísir og tíðarrit, hevur Kummer skrivað fleiri bøkur. Millum annað gav hann í 2007 út bókina »Kleiner Knut ganz groß. Der berühmteste Eisbär der Welt im Gespräch mit Tom Kummer«, sum, sambært honum, byggir á samrøður við ísbjørnina Knút, sum doyði herfyri.**

*Tað er undrunarvert, at eingin av mongu heimsstjørnunum, reageraðu upp á sonevndu samrøðurnar, Kummer gjørdi við tær. Sjálvur sigur Kummer seg vita, at bæði Sharon Stone, Tom Hanks og Quintin Tarantino elskaðu hesar samrøður og tankan um, at mongu stjørnurnar prátaðu við hann um ymsu evnini. Tey elskaðu tað, fólkið elskaði tað og tískil gjørdi eingin vrøvl, heldur hann*




Die Zeit, Der Spiegel, Neue Zürcher Zeitung, Frankfurter Allgemeine, Stern og Vogue prentaðu samrøðurnar, Kummer gjørdi í Hollywood.

So tiltiknar gjørdust samrøðurnar, at avrátt var at savna tær bestu í eina bók, sum varð send til prentingar, áðrenn alt var avdúkað og bókaútgávan tikin aftur.

## Alt var lygn

Alt vísti seg nevniliga at vera lygn. Hvør einasta samrøða úr enda í annan, var íspunnin av Kummer, sum ongantíð hevði verið nær námind nakrari heimsstjørnu.

Tað var eftir eina sonevnda samrøðu við leikkvinnuna Christina Ricci í 2000, at ein starvsfelagið og kappingarneyti hjá Kummer, avdúkaði loyndarmálið. Sostatt gjørdist greitt, at tað, sum Kummer gjørdi øðrvísi enn allir aðrir journalistar, var, at hann leyg. Tað serliga, hann hevði fram um allar aðrar, var lygnin.

Kummer sjálvur var púra róligur, tá hetta kom fram. Hann ynskti heldur ikki at bera um umbering fyri nakað sum helst. Hvørki yvirfyri lesarunum, stjørnunum ella teimum báðum blaðstjórunum, sum fingu sekkin eftir avdúkingina.

Tað vísti seg nevniliga, at ikki ein einasti blaðstjóri nakrantíð hevði sett fram ynski um, at Kummer skuldi dokumentera nakra samrøðu. Eingin eftirlýsti nakrar bandaðar upptøkur ella annað tilfar, sum onkursvegna kundi prógva, at samrøðurnar veruliga vóru gjørdar.

Av tí sama hevði Kummer frítt spæl. Hann kundi gera sum honum lysti og tað gjørdi hann. Tískil er ábyrgdin ikki hansara, metir hann. Í filminum, Bad Boy Kummer, sum nýliga er útkomin um Kummer og hansara avrik, sigur hann soleiðis:

– So býttur kann eingin vera, at tey hildu, at eg kundi koma so tætt inn at øllum stjørnunum.

Kummer hevur eisini sagt, at hann heldur vil lýsa seg sum listamann enn journalist. Og í bretska The Guardian um dagarnar vaskar Kummer enn einaferð hendur sínar:

– Eg skrivaði impressionistiskt, kreativt og skaldsliga um stjørnurnar í sonevndum samrøðum. Ein og hvør blaðstjóri hevði uppdagað hetta, um ikki hann og fólkini kring hann vóru fullkomiliga inkompetent, segði hann við bretsku avísina.

Hesa sonevndu impressionistisku, kreativu og skaldsligu tilgongdina til journalistikkin, hevur Kummer valt at rópa borderline journalistik. Ein grein, Kummer, sjálvur hevur uppfunnið, men sum kortini ikki er viðurkend millum journalistar kring knøttin.

Tað sama kann sigast um Kummer sjálvan. Hann telist ikki longur millum viðurkendar journalistar. Hann hevur roynt seg í ymsum avísum, umframt at hava givið nakrar bøkur út, men fólk hava sera trupult við at taka mannin í álvara.

Tískil livir Kummer í dag eina hampiliga anonyma tilveru í Los Angeles, har hann vinnur til lívsins uppihald sum tennisvenjari. Heilt gloymdur er hann kortini ikki, tí um dagarnar varð filmurin Bad Boy Kummer frumsýndur; ein filmur, sum er ein roynd at skilja, hví sera evnaríki og dugnaligi journalisturin valdi at framleiða lygnir og servera tær sum sannar søgur.

**KELDUR:** THE GUARDIAN, BERLINGSKE OG BAD BOY KUMMER